BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

4. mai 2025
Mál: 22/22133-127
Viðgjørt: -

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, nr. 52-101/2024 eftir § 52a í tingskipanini, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um týðing til føroyskt innan útbúgvingarøkið.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1) Hvussu nógv tilfar verður týtt til føroyskt um árið innan økið hjá landsstýrismanninum? Metir landsstýrismaðurin, at tað er nóg mikið?
2) Hvør týðir tilfar til føroyskt, og hvat slag av tilfari týða tey?
3) Hvussu nógv fíggjarorka verður tilsamans nýtt til at fáa til vegar týtt tilfar árliga á økinum hjá landsstýrismanninum?
4) Verður arbeitt við at menna eina útbúgving í týðing á Fróðskaparsetri Føroya?

Svar

Til 1: Seinastu 5 árini hevur Nám givið út umleið 20 bøkur árliga, harav umleið helvtin eru týðingar. Harnæst gevur Bókadeild Føroya Lærarafelags umleið 65-70 týddar bøkur út um árið.

Til 2: Tað eru í høvuðsheitum lærarar, sum týða, bæði hjá NÁMI og hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags. Talan er um bæði undirvísingartilfar og barnabókmentir.

Til 3: Í 2024 brúkti Bókadeild Føroya Lærarafelags 406.700 kr. upp á at keypa rættindi og prentfílur, umframt 363.145 kr. til týðarasamsýning.

Tað fyriliggur ikki nakað neyvt tal yvir, hvussu nógv NÁM hevur brúkt í sambandi við at týða bøkur, hetta tí at týðing ikki er endamál í sær sjálvum hjá Námi, sum ger mest upprunatilfar.

Til 4: Á Fróðskaparsetri Føroya kann ein taka skeið í týðing. Talan er her um eitt skeið á 10 ECTS, sum verður boðið út regluliga á útbúgvingini í føroyskum, bæði á bachelor- og á masterstigi, og á útbúgvingini í ritlist, sum er á bachelorstigi.

Skeiðið verður eisini boðið út sum stakskeið.

Útyvir hetta, verður ikki arbeitt við at menna nakra útbúgving innan týðing.

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

J. H. Schrøtersgøta 7 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 306500 • bumr@bumr.fo